**HDYGD 10 ÁRA TRYGD**
Á ØLLUM VØRUM



VØKUR VINDEYGU, SUM HALDA

# TRÆ ALU

Um tú vilt hava vakrar og hugnaligar trærammur innan, men vilt sleppa undan viðlíkahaldi uttan, er HDYGD træ/aluvindeyga tað rætta til tín.



Talan er um kenda HDYGD trævindeygað, sum hevur fingið viðlíkahaldsfríar aluminiumsprofilar uttan at verja fyri veðri og vindi. Hetta ger, at vindeyguni krevja lítið og onki viðlíkahald, meðan hugnin frá trænum verður varðveittur innan.

HDYGD træ/aluvindeyga eru fevnd av 10 ára trygdini, sum vit veita øllum okkara viðskiftafólkum.

**HALDGÓÐ VINDEYGU**
Bygnaðurin í HDYGD træ/aluvindeyganum ger, at bjálvingin og tættleikin er eins góður sum á tí vælkenda HDYGD trævindeyga-num.

Í mun til HDYGD trævindeyga, sum hevur ein alu-rútalista í neðra at verja mest ábæra staðið á vindeyganum, er allur karmurin á HDYGD træ/aluvindeyganum klæddur við aluminium fyri at verja træi fyri regni og sólarljósi.

**KJARNUVIÐUR OG ROTVIÐGERÐ**
Okkara royndir við føroyska veðurlagnum ger, at vit umframt at brúka kjarnuvið eisini rotviðgera træið. Hetta leingir livitíðina á HDYGD træ/aluvindeyganum so mikið, at tað livir væl longur enn líknandi vindeygu frá øðrum veitarum.

HDYGD træ/aluvindeyga hevur 65 til 70 % av kjarnuviði, sum gevur natúrliga rotviðgerð.

Timbrið verður lagt í rotviðgerðarløg, so træið sýgur í seg at minst 5 mm rotviðgerð er undir yvirflatuni og minst 5 cm í øllum endum. Tað forðar fyri, at rotið byrjar, beinanvegin slit kemur á málingina, ella vindeygað fær eitt prus.

## "
Velur tú HDYGD træ/ aluvindeygu, sleppur tú undan mestsum øllum viðlíkahaldi



**SPROSSAR**
Til HDYGD træ/aluvindeygu fáast sprossarnir sum gjøgnumgangandi og sum sprossar millum gløs.

**LITIR**
Sum standard er HDYGD træ/alu vindeygað hvítt, men kann eisini fáast í øllum hugsandi litum, bæði innan og uttan.

Alulistarnir, sum verða settir niðast á vindeygakarmin, og ventilarnir eru hvítlakkaðir á hvítu vindeygunum og gráir, tá ið karmurin hevur annan lit.

**LØTT OG EINFØLD RØKT**
Velur tú HDYGD træ/aluvindeygu, sleppur tú undan mestsum øllum viðlíkahaldi uttan. Innan er sum á vanligum trævindeyga.

Besløg og mekanismur eiga at verða smurd tvær ferðir árliga.





## HDYGD træ/ aluvindeyga kann fáast í øllum hugsandi litum, bæði innan og uttan